# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tú skuldi pínadoy trúð, at vit bukaðu málverjarnar við gassum ella onkrum líknandi, men tað gera vit altso ikki*

*Henrik Larsen*

# Nýtt felag var besta loysnin



*Tað er fyri at økja um breiddina, at Heri Ziska, Randi Kúrberg og onnur hava tikið stig til at stovna nýtt frælsisfelag*

**– Eg og Randi Kúrberg hava sett okkum persónlig mál við frælsa ítróttinum á bana. Vit mettu, at hetta var besta loysnin, um vit skulu røkka teimum, sigur Heri Ziska, sum er annar av stigtakarunum til nýggja frælsafelagið, sum hevur stovnandi aðalfund leygardagin**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

– Bragdið stríðist mest fyri renningini. Vit fara ikki at skipa fyri renning á landavegnum ella nakað tílíkt. Vit geva børnum aðrar møguleikar.

Ímyndirnar av frælsa ítróttinum á bana í Føroyum seinastu mongu árini, Heri Ziska og Randi Kúrberg, fara seinni í vikuni at seta á stovn egið felag. Hóast hugskotið er nýtt, so hava tey borið skjótt at. Leygardagin verður stovnandi aðalfundur og fari verður til verka alt fyri eitt.

## Hugsa ikki langt

Heri Ziska hevur staðið fyri nøkrum av bestu úrslitunum í fræslum ítrótti á bana, har hann millum annað hevur vunnið heiðursmerki fyri Føroyar á Oyggjaleikum. Landsliðið er tó ikki fremst í huganum, nú nýggja frælsafelagið skjótt fer at síggja sínar fyrstu dagar.

- Vit hava havt barnavenjingar í vetur, og undirtøkan hevur verið stór. Dagliga koma fyrispurningar, um tað er pláss fyri fleiri. Vit hugsa ikki tíggju ár fram. Eitt av endamálunum er at fáa eitt lið á 25 børn at byrja á hvørjum ári. Seinni velur íðkarin so sína grein. Um nøkur ár kunnu vit so eisini hugsa um elituna, um møguleiki er fyri hesum, sigur Heri Ziska, sum ikki dugir at síggja nakran trupulleika við, at tvey frælsafeløg eru í høvuðsstaðnum.

Hann staðfestir eisini, at serligur dentur verður lagdur á barna-og ungdómsvenjing á bana, har tørvurin á tilboðnum er størstur.

## Kappast við Bragdið

Tað hevur mangan verið havt á munni, at tað er alt ov lítil kapping um plássini, tá liðið fyri frælsan ítrótt skal veljast til Oyggjaleikirnar. Við tveimum feløgunum kann hugsast, at skipa verður fyri kappingum, sum kunnu lyfta støðið.

- Sjálvandi hevði tað verið hugaligt, um Bragdið stóð fyri onkrum kappingum, sum ikki vóru renning - men á bana. Tað økir áhugan fyri ítróttinum og mennir íðkaran.

Tað er ikki orsaka av ónøgd í Bragdinum, at tit nú royna hetta

– Nei, als ikki. Eg og Randi Kúrberg hava sett okkum mál við frælsa ítróttinum á bana. Vit mettu, at hetta var besta loysnin, um vit skulu røkka teimum, sigur Heri Ziska.

# Tryggjaði sær HM-luttøku

**Shaila millum Garðarnar tryggjaði sær leygardagin luttøku til HM, tá hon setti nýtt føroyskt met í 100 metrar frísvimjing**

SVIMJING
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tá Shaila millum Garðarnar úr Suðuroyar Svimjifelag í gjár setti nýtt føroyskt met í 100 metrar frísvimjing, var somuleiðis greitt, at hon eisini luttaka í HM. Tíðin var 0.58,52. Hon er ein av fýra svimjarum, sum hava svomið seg til gullnál seinasta árið, undir leiðslu av Jón Bjarnason.

Pál Joensen úr Suðuroyar svimjifelag og Kári á Høvdanum úr Fuglafjarðar Svimjifelag skulu eisini svimja í HM.

Malan V. Bærendsen og Pál Joensen settu eisini met fríggjakvøldið. Hetta var í ávikavist 50 metrar bringusvimjing og 800 metrar frísvimjing. Tíðirnar vóru 34,94 og 8.00,05.

Sambært svimjing.com er tíðin hjá Páli Joensen nummar 30 av bestu tíðunum í heiminum síðan 1. august í fjør. Hetta er somuleiðis besta tíðin hjá juniorum.



*Shaila millum Garðarnar sleppur nú at taka lut í kappingini um heimsmeistaraheitið. Leygardagin svam hon 100 metra frí í nýggjari mettíð*

